## Tekstur, lyndi og mentan

Í nýggjari bók, sum Fróðskaparsetur Føroya gevur út, eru fyrilestrar frá norrønari gransking-arstevnu um bókmentir og lyndi - mentalitet - savnaðar. Heiti er "Nordisk litteratur og mentalitet" og ritstjórar eru Malan Marnersdóttir og Jens Cramer. Stevnan varð fyriskipað av Føroyamálsdeildini og varð hildin á Fróðskaparsetrinum 3.-9.august 1998. Hetta var 22. ferðin at felagsskapurin International Association for Scandinavian Studies møttist at granska norrøn viðurskifti. Evnið - tekstur, lyndi, mentan - varð samtykt á stevnu í Bonn tvey ár undan. Næsti fundur í felagsskapinum var hildin í Norwich í Onglandi í august í ár. Nýggja bókin, ið savnar allar fyrilestrar og íkast frá stevnuni í Føroyum í 1998, telur yvir 600 síður. Í drúgva innihaldsyvirlitinum, sum fevnir um 69 greinar, er bert ein, ið hevur burturav føroyskan vinkul. Tað er Anne-Kari Skarðhamar, sum viðgerð skaldskapin hjá Christiani Matras undir yvirskriftini "Hella, hugur og tíð - tidserfaring i Christian Matras' diktning". Hin 7. desember er hundrað ára dagur Chr. Matras. Í inniganginum verður upplýst, at eitt annað íkast til bólkaarbeiði hesar dagar á Fróðskaparsetrinum var um William Heinesen, sum Hanne Flohr Sørensen helt undir heitinum "William Heinesen og Færøerne - mellem middelalder og modernitet". Á sama hátt hevur Vár í Ólavsstovu í bólki reika fyri evninum at senda drunn. Heiti var "Bryllupsskikken at senda drunn - et levn af en frugtbarhedskult". Hesir partar eru tó, eins og 22 líknandi, ikki tiknir við í bókina. Fyrilestrarnir í bókini "Nordisk litteratur og mentalitet" fevna um almenn bókmentunarlig viðurskifti og ógvuliga nágreinilig - spesifikk - fyribrigdi í granskanini av norrønum teksti, mentan og lyndi.

## Scandinavia House í Now York tiki í nýtslu

Nýbygda Skandinaviahúsið í New York varð vígt 17. oktober við stórari norðurlendskari luttøku. M. a. var Karl Gustav kongur av Svøríki til staðar, Benadikta prinsessa úr Danmark, Martha Luisa prinsessa úr Noregi, Ólafur Ragnar Grímsson, forseti Íslands og Kimmo Sasi, uttanríkisráðharri Finnlands. Skandinaviska Húsið verður miðstøð hjá norðurlondum, og stjórnirnar í teimum fimm sjálvstøðugu norðurlondunum hava stuðlað húsinum, og Ráðharraráðið hevur latið 250.000 USdollarar.

Framsýningin »Vikings - the North Atlantic Saga« hevur fingið sera góða undirtøku í Washington, har fleir ein ein millión fólk hava sæð hana. Nú verður hon flutt til New York, og lat hon upp hósdagin í American Museum of Natural Histori. Í New York er framsýningin opin til 20. januar komandi ár. Síðani heldur hon fram í øðrum stórbýum á amerikan ska meginlandinum.

## Vilja hava Kinder-egg av hillunum

Danska brúkararáðið tekur undir við einum bólki av bretskum ES-politikarum, sum vilja hava eitt forboð ímóti Kinder-eggjum.

Orsøkin til kravið um eitt forboð er, at samantvinningin av góðgæti og leikum er óheppin og hevur seinastu árini kravt fleiri mannalív. Vandin er nevniliga stórur fyri, at børn svølgja leikuna, tá hon verður seld saman við góðgæti ella mati annars.

Seinastu 15 árini eru sjey børn í ES-londum deyð, eftir at tey hava roynt at svølgja leikur av hesum slagi.

Í Svøríki heldur brúkararáðið eisini, at neyðugt er við einum forboði, og í USA eru framleiðslur sum Kinder-egg forboðin.

Tað er italska fyritøkan Ferrero, sum framleiðir Kinder-eggini, sum eisini eru at fáa til keyps í Føroyum.

ek

## Tveir tímar við U2”

Írski rockbólkurin U2, sum í drúgva tíð hevur verið taldur millum mætastu av sínum slagi, gevur nýggja fløgu út hin 30. oktober. Ein forsmakk hava viðhaldsfólk fingið um alnótina við sonevndum e-cards á heimasíðuni hjá bólkinum. Heiti á nýggju fløguni er "All that you can't leave behind". Mánadagin 23. oktober verður høvi at hoyra enn meir frá írsku garpunum, sum vilja annað og meir enn bert undirhald. Tá fer bólkurin í útvarpshøli hjá BBC Radio One, har útvarpsfólk tosa við limirnar í bólkinum, eins og brot úr nýggju fløguni verða framførd. Útvarpssendingin, sum bara BBC sleppur at senda, verður tó eisini send á heimasíðuna hjá bólkinum sjálvum. Her kann allur heimurin bæði síggja og lurta "on line", tey rópa. Adressan er www.u2.com. Tað eru tey bæði Simon Mayo og Jo Whiley, ið sum einastu journalistar í heiminum hava fingið orð á U2, sum í dag man verða heimsins stórsti rockbólkur. Tey bæði BBC fólkini halda til í sonevndu Maida Vale upptøkuhølunum í London og útvarpssendingin byrjar mánadagin klokkan 11 bretska tíð og varir tveir tímar. Ivaleyst verða mangir løgreglumenn at síggja við dyrnar hjá BBC mánadagin.

**post@sosialurin.fo**

**TELDUPOSTURIN**

From: edmund_jacobsen@hotmail.com
Reply to: edmund_jacobsen@hotmail.com
To: <post@sosialurin.fo>
Subject: Teldubrævið

## Eri eg føroyingur?

Í 8 ár havi eg verið búsitandi í Danmark, havi fingi góðar og ringar danskar vanar og næstan fingi útrudda mín føroyska accent. Men innast inni eri eg enn tann sami, sum tá ið eg flutti niður í 1992. Ein føroyingur.

Ella eri eg?

Nú eitt kvøldi kom ein vinmaður framvið har eg búgvi. Hann kom bara, hatta freka apparatið! Einki við at ringja áðrenn og spyrja um eg var inni, ella um eg hevði tíð til at fáa gestir. Og eg sum júst var við at skriva eitt ella annað sera tydningarmikið á telduna. Hevði rokna við at hava kvøldið fyri meg sjálvan. Men nei!

Tá ið eg lat hurðina upp, og sá, at hann stóð har, var eg eitt sindur súrur. Men so trein eg inn í leiklutin sum fryntligur og altíð fyrikomandi vertur. Lat hann ikki síggja hvussu argur og tvitin eg var.

»Kom indenfor« segdi eg brosandi og lat úthurðina aftur.

Nú skal eingin halda, at eg altíð eri argur, tá ið vinmenn ella kenningar koma framvið. Men í Danmark er tað nú einaferð soleiðis at fólk ringja áðrenn tey koma framvið. So tosar man saman um leyst og fast, áðrenn man saman finnur eitt passanði tíðspunkt sum passar.

»Det er en aftale. Vi snakkes ved«.

Og so fer man í holt við at fyrireika at fåa vitjan. Keypir kanska okkurt serligt til matna, vín og bjór, eina góða køku kanska?

Soleiðis er tað í Danmark, tá fólk vitja hvønn annan. Tað er organisera, tíðarfest og lagt til rættis sum eitt væl umhugsa bankarán. Ikki nakað við bara at koma brestandi uttan at boða frá. Nei, danskarar - teir flestu ið hvussu er - kenna sína vitjunartíð.

Eg eri føroyingur. Men longu nú sært tú nokk, kæri lesari, at okkurt er galið. Tað er okkurt ravruskandi gali við einum persóni, ið ikki kann tola at fåa vitjan uttan at alt er avtala niður til minsta punktum. Hvar er spontaniteturin. Hvar er treytaleysa samanhaldið? Hvar er víðagitna, føroyska gestablídni?

Nú eitt árið var eg ein túr uppi á klettunum saman við gentu míni. Tað er altíð hugnaligt at koma til Føroyar, og sita heima í køkinum hjá mammu síni og eta seg um koll við skerpikjøtið, rullipylsu og røstun fiski. Genta mín hevur fleiri ferðir undrast á óføra gestablídni sum føroyingurin vísir, ta ið fólk koma á gátt. Tað er líkamikið um tað er skilfólk, vinir ella fremmandafólk.

Serliga øtaðist hon einaferð vit fóru á Ólavsøku uttan at hava biðji um innivist nakrastaðni.

»Tað gongur nokk«, segði eg bara. Og tað gekk!

Soleiðis eru føroyingar bara. Eg minnist serliga tá ið eg var blaðungur, og ikki ein stevna ella rockkonsert fór framvið uttan at eg og vinmenn mínir luttóku. Ofta fóru vit inn í fyrsta og besta húsið fyri at lána telefon, toilet ella - jú tað er satt - fyri at vita, um ikki ein góður nátturabiti stóð á borðinum.

Eg kann ikki minnast at húsfólkini vórðu avvísandi, tvitin ella bóðu okkum fara okkara veg aftur. Tú skalt sera langt út á landið í Danmark fyri at uppliva nakað nær námind. Í Føroyum er tílíkt gestablídni ein partur av gerandisdegnum.

Í mínum barnaárum vóru fleiri heim, har tað hvønn dag var ein tættur trafikkur út og inn ígjøgnum úthurðina. Fólk komu og fóru allatíðina. Tosaðu eina løtu, fingu kanska ein hálvan kopp af kaffi, og so avstað aftur.

Einki var avtalað áðrenn. At fólk komu og fóru um gáttina var ein líka fastur táttur í gerandisdegnum sum at keypa inn ella busta tenn.

Eg eri føroyingur. Og eg skal viðganga, at sum árini ganga hugsi eg alt meira um at flyta aftur á klettarnar. At njóta føroysku náttúrina, tað frísku luftina, tað føroyska sinnalagi og serstakliga tað føroyska gestablídni. So ein fagran dag, so eri eg sikkurt búsitandi í Føroyum.

Men eg eri vísur í, at okkurt kvøldið, tá ið eg havi sett meg væl fyri framman fyri telduna, skonkt mær ein kpo av kaffi og alt er í fínasta lagi. So bankar uppá hurðina, og uttanfyri stendur ein vinmaður, eg ikki havi sæð í øldir.

Innast inni farið eg nokk at verða sera argur, og hava hug til at biðja hann fara har sum pipari grør. Men tað endar nokk við at eg sigi: »Nei nei nei, tú órógvar als ikki. Kom inn kom inn«.

# ítróttur

Nr. 203 • leygardagur • 21. oktober 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo



*Vongplássið er ein av sessinum, har kyndilslið tykist styrkt, nú Brynhild Klein hevur tikið harpiksið fram aftur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Kyndil-Tajldur 36-24 (15-13)

## Lættur sigur

**Hondbóltur, kvinnur: Uttan stórvegis hóvasták vann Kyndil ein hampuliga tryggan sigur á Tjaldri, sum aftur í ár fer at hava tað trupult**

Hondbóltur
*Jákup Mørk*

Upprunaliga skuldi hetta vera fyrsti landskappingardystur á árinum hjá liðunum báðum, men onkursvegna var dysturin útsettur, tá kappingin skuldi byrja.

Hóskvøldið høvdu so bæði liðini stundir til at avgreiða setningin, og sum væntað, so gjørdist tað Kyndil, ið streyk avstað við báðum stigunum.

### Lág ferð

Fyrsta partin av dystinum var annars ikki tann stóri munurin á liðunum báðum. Tjaldur fylgdi væl við, og tær vóru eisini á odda okkurt skifti í hálvleikinum.

Tað tóktist tó alla tíðina eyðsæð, at tað tó bert var ein spurningur um tíð, so skuldi Kyndil fara avstað.

Ann Hansen byrjaði á beinkinum, og tað setti eisini beinan vegin nakað av ferð á Kyndilsspælið, tá hon kom inn. Leikferðin hevði annars fram til tá verið óvanliga lág. Kyndil rykti tá nakað, men móti endanum fekk Tjaldur tó aftur toga seg eitt sindur fram aftur.

### Orkan ov lítil

Í seinna hálvleiki fór Kyndil rættiliga skjótt at draga frá, og orsøkin til hetta var eisini eyðsýnd.

Leikferðin, sum allan fyrra hálvleik hevði verið í lægra lagi, varð sett nakað upp, og so megnaði Tjaldur ikki at fylgja við.

Longri tað leið út á dystin, størri gjørdist munurin, og tað var týðiligt, at munurin í venjingarstøðu hjá liðunum var stórur.

Í einum tveimum førum slapp Kyndil at skjóta fimm-seks mál á rað, og móti endanum tóktust tær hugsa meira um, at allar skuldi sleppa á málskjúttalistan.

### Ov tunt

Uttan at leggja nakað serligt í úrslitið, so ber kortini til at staðfesta, at enn væntar nakað í hjá liðunum báðum.

Ringast stendur til hjá Tjaldrinum, sum als ikki tykist vera gearað til fyrstudeildarhondbólt. Teknisku feilirnir eru ov nógvir í tali, og eisini tykist tað, sum at orkan til at spæla er ov lítil.

Ein betran av hesi hevði ivaleyst komið væl við, tí hóast teknisku manglarnir, so megna tær tó eisini at spæla hondbólt, men ikki í trýss minuttir. Hetta kom eisini til sjóndar fleiri ferðir í fjør, tá tær í nøkrum dystum fylgdu væl við í tríggjar fjórðingar av dystinum, men so dragnaðu afturúr seinastu løtuna.

Hjá Kyndli tykist størsti trupulleikin at vera, at breiddin í hópinum er ov lítil. Ella skuldi man kanska sagt ov lítil á ávísum plássum.

Serliga ringt tykist hetta vera í miðjuni, tí hóast mótstøðan hóskvøldið ikki var av teimum størstu, so fall leikferðin og – dygdin, hvørja ferð onkur av miðella bakspælarunum fór út á beinkin at hvíla seg.

Heldur ikki er liðið so væl fyri á málverjasessinum, sum tær onkuntíð hava verið. Hetta skal tó ikki vera nýggju málverjunum til last, tí tað er avgjørt ikki nøkur løtt uppgáva at skula loysa fyrst og fremst Maritu Hermansen av.

Samanumtikið tykist soðið vera ov tunt til, at Kyndil veruliga skal blanda seg upp í oddastríðið í ár, men hinvegin kunnu tær kanska tosa við, tá annað slag av málmi enn gull skal býtast út.

**Dysturin í tølum:**
Kyndil-Tjaldur 36-24 (15-13)

*Málskjúttar*
*Kyndil:*
Lotte Sørensen 11(5), Jórun Ludvig 7(2), Ann Hansen 6(1), Anita Kjærbo 3, Signhild Petersen 2, Semona Fjallstein 2, Jensia Petersen 2, Kristbjørg Petersen 1, Kristina Holm 1, Brynhild Klein 1

*Tjaldur:*
Beinta Joensen 7(1), Sunrid Gleðisheygg 6, Ann-Mari Østerø 4, Mona Langgaard 3, Kristine Ellingsgaard 3(1), Oddvá Fossdalsá 1

*Brotskøst:*
Kyndil 8, Tjaldur 4

*Útvísingar:*
Kyndil 1, Tjaldur 1

## Oddabrak í Klaksvík

**Fimm dystir eru á skránni hetta vikuskiftið, og ikki minst man spenningur vera um dystin í Klaksvík, tá Dráttur kemur á vitjan hjá Føroyamestarunum**

Flogbóltur
*Magnus Tausen*

Næsta umfar í flogbóltslandskappingini er á skránni um vikuskiftið. Einir 25 landskappingardystir eru á skránni í ymsu deildunum.

### Meistaradeild kvinnur

Í meistaradeildini hjá kvinnum eru tríggir dystir.

Dysturin leygardagin millum Mjølnir og Drátt er ógvuliga áhugaverdur. Mjølnir hevur seinastu árini staðið seg sera væl. Tær hava verið føroyameistarar ferð eftir ferð, og seinasta kappingarár taptu tær bara ein dyst.

Í ár tykist Dráttur at kunna hótta Mjølnir. Við nýggja útlendska venjaranum á odda fara tær til Klaksvíkar at gera tað ómøguliga – vinna á Mjølni. Hesin dysturin fer ikki at avgera hvar gullið endar, men hann fer at geva ávísar ábendingar.

Mjølnir hevur vunnið gull 9 ferðir síðan meistaradeildin varð skipað í 1986. Dráttur hevur ongantíð vunnið føroyameistaraskapin, tó tað onkuntíð hevur verið nær við.

Hin dysturin leygardagin er millum Fossanes og ÍF. Hesin liðini taptu í fyrsta umfari og skulu nú fáa fyrstu stigini til hóldar. Her má sigast, at ÍF hevur betru møguleikarnar at vinna, tí liðið hevur royndirnar. Fossanes er framvegis í læru í bestu flogbóltsdeildini, men tó skal ikki vera sagt, at tær longu eru foknar.

Dysturin hjá kvinnunum sunnudagin er millum TB og Fleyr. TB vann í fyrsta umfari og Fleyr tatpi. Heisi liðini eru nakað torfør at meta um, tí TB hevur mist nógv fólk, og Fleyr er ógvuliga óstøðugt, bæði leikliga og innanhýsis á liðnum. Skulu tær vinna á TB sunnudagin, skal nógv gerast betur enn seinasta sunnudag ímóti Drátti og TB er væl fyri heima.

### Meistaradeild menn

Hjá monnunum er sum vant bara tveir dystir á skránni:

Í Klaksvík skal Mjølnir stríðast við SÍ. Tað plagar at ganga væl hjá Mjølni, tá ið SÍ er á vitjan, og í ár stendur sera væl til við fólki hjá Mjølni. Hjá SÍ kann alt henda, letur tað til. Í dystinum seinasta leikumfar, sum var ímóti Felyr, spældu teir út av lagi vánaligt fyrst í dystinum, men vendu so gongdini og kundu havt vunnið, tá ið av tornaði. Mjølnir má tó metast at vera betur fyri til dystin leygardagin.

Í Eysturskúlanum verður so fyrsta slagið um Havnina. Fram og Fleyr hava leikt mangar sera góðar og spennandi dystir. Seinasta kappingarár var tað tó eingin, ið kundi fylgja við Fleyr, men í ár er liðið hjá Fram ment, og liðið hjá Fleyr er nógv broytt, og helst eisini viknað nakað. Hesir dystirnir eru altíð nakað heilt serligt. Menn leggja nógv fyri, og ofta leikar hart á.

Romica Pascu venur í ár Fram. Hann vandi Fleyr seinasta kappingarár, so kanska veit hann okkurt gott vápn at koppa teir við. Romica spælir sjálvur við á liðnum hjá Fram, og styrkir hann væl um. Eisini er Heini Weihe komin aftur til Føroya at búgva, og spælir hann sjálvandi við barndómsfelagnum Fram.

Fram og Fleyr dystaðust í FK-kappingini, sum Fleyr skipaði fyri. Tá megnaði Fram akkurát at vinna eftir sera javnan og spennandi dyst. Alt er tí opið undan dystinum leygardagin.